



**Stovnur:** Dagstovnurin Lítliskógur
**Adressa:** Djóna í Geil gøta 51
**Upplatingartíð:** 07.30 - 17.15
**Telefonnr.:** 302280 (skrivstovan)
**Fartelefon:** 21 91 35 (leiðari)
**Leiðari:** Beinta Dalbø
**Varaleiðari:** Heidi Norðoy
**Álitsfólk:** Beinta Rubeksen
**Trygdarumboð:** Marita Bech
**Teldupost:** litliskogur@torshavn.fo
**Heimasíða:** www.litliskogur.fo

**Telefonnr.:**

| | |
|---|---|
| 302280 | Skrivstova |
| 302275 | Køkur |
| 302276 | Álvalund skúlastova |
| 302277 | Álvalund barnagarður |
| 302278 | Eikilund vøggustova innara |
| 302279 | Eikilund vøggustova uttara |
| 302281 | Vættralund barnagarður innari |
| 302282 | Vættralund barnagarður uttari |

**Frídagar, upp- og afturlatingartíðir:**

Stovnurin letur upp kl. 07.30 og letur aftur kl. 17.
Virksemið – bæði tað ætlaða og tað "spontana" – byrjar kl. 09.30.
Tí skal barnið møta áðrenn kl. 09.30.

**Vit lata aftur:**

3 vikur í summarfrítíðini.
Millum jól og nýggjár.
Flaggdagin.
Grundlógardagin lata vit aftur kl. 12.00.
Eisini er stovnurin stongdur tveir ráðleggingardagar um árið.

**Gjaldið:**

Gjaldið er yvir 11 mánaðir og skal gjaldast fyrst í hvørjum mánaði.
Vøggustovupláss kr. _______________
Barnagarðspláss kr. _______________

Skrivlig útmelding, 2 mðr. uppsagnarfreist, galdandi frá 1. ella 15. í komandi mánað.
Uppsagnarskjal fæst á skrivstovuni og á torshavn.fo.

# Lítliskógur











# Góðu børn og foreldur

Vit bjóða tykkum at vera vælkomin í Lítlaskóg.

______________________________________________

skal ganga á ______________________________________

Her ganga ________ børn.

**Lýsing av stovninum**

Dagstovnurin Lítliskógur lat upp 01.02.1990.
Lítliskógur liggur á fríøki, nær við lítlan skóg, fótbóltsvøll, fjøru, Hoyvíkstjørn og Skansan.

Á stovninum eru tríggjar barnagarðsstovur við 3-5 ára gomlum børnum, tvær vøggu-stovur við 0-3 ára gomlum børnum og ein skúlastova við 6 ára gomlum børnum.

Stovurnar eru deildar upp í tríggjar eindir: Vættralund, Eikilund og Álvalund. Í hvørjari eind eru tvær stovur; í Vættralund eru tvær barnagarðsstovur, í Eikilund eru tvær vøggustovur og í Álvalund er ein barnagarðsstova og ein 6 árs stova.

Ymiskt er, hvussu virksemi verður lagt til rættis á stovunum. Tørvurin er ymiskur og virksemi er lagað eftir aldursbólkinum á stovuni. Virksemið er litað av teimum dygdum, starvsfólkið á stovuni hevur.

Felags fyri okkum øll er, at stórur dentur verður lagdur á at hava gott foreldrasamskifti. Fyri at vit skulu kunna geva børnunum ein góðan gerandisdag, er týdningarmikið við góðum samskifti. Hettar leggja vit okkum eftir í tí dagliga prátinum.

Tit eru altíð vælkomin at steðga á og fáa eitt prát ella biðja um eina samrøðu, og um trupulleikar stinga seg upp, leggja vit dent á, at teir verða loystir á røttum stað.

**Góðan morgun og farvæl**

Starvsfólkið leggur stóran dent á at taka væl ímóti barninum hvønn dag, soleiðis at tit merkja, at tað er í góðum hondum. Tað er somuleiðis sera umráðandi fyri tryggleikan hjá barninum, at foreldrini siga farvæl við barnið.

**Klæði**

Við okkara skiftandi veðurlagi, skal barnið hvønn dag hava heit klæði við, s.s. ullinta troyggju og hosur, regnklæði og gummistivlar. Eyka sett av klæðum skulu liggja í kassanum. Navn skal vera í øllum klæðunum. Hvønn fríggjadag hava foreldrini ábyrgd av at rúmið hjá barninum er ruddað og at tað er nóg mikið av skiftiklæðum.

**Blæur**

Børnini í vøggustovunum fáa blæur. Barnagarðsbørn, ið brúka blæu, mugu hava tær við.

**Matur**

Øll børnini fáa mjólk og millummála hvønn dag. Harumframt er døgurði ein dag um vikuna. (Kostnaðurin av døgurðanum er 50 kr. um mánaðin).

**Leikur**

Um børnini hava leikur við heimanífrá, er hetta foreldranna ábyrgd.



**Sjúka**

Um barn tykkara er sjúkt, vinarliga sigið frá á stovuni. Sjúk ella smittuberandi børn skulu ikki koma á stovn.